LM-020/2025

Fíggjarstøðan hjá teimum lesandi á Setrinum

Ráð Teirra Lesandi og Meginfelag Føroyskra Studenta

summar 2024


MFS
MEGINFELAG FØROYSKRA STUDENTA


RTL
RÁÐ TEIRRA LESANDI

* Allar stabbamyndir í hesi framløgu eru 'LM-020/2025'
av einum starvsfólki á Lestrarskrivstovuni á Setrinum.

Luttakarar


- 49.5% av teimum lesandi á Setrinum luttóku í spurnarkanningini






Bústøða

- Nógvar kvinnuligar lesandi búgva saman við maka og børnum
- Nógvir mannligir lesandi búgva saman við foreldrum og/ella systkjum, annars er nokk so javnt um teir búgva einsamallir, ella saman við maka, við ella uttan børn







Bústøða

- Áleið 60% av kvinnunum og 45% av monnunum búgva í egnum bústaði, ella til leigu
- Áleið 20% av kvinnum og 30% av monnunum búgva ókeypis hjá øðrum, og áleið 15% búgva hjá øðrum og gjalda leigu

- Áleið 25% av kvinnunum og 35% av monnunum búgva ókeypis
- Áleið 30% av kvinnunum og 35% av monnunum gjalda millum 3.000 og 6.000 kr fyri at búgva
- Áleið 30% av kvinnunum og 15% av monnunum gjalda meira enn 6.000 kr fyri at búgva





Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – fíggjarliga tengd at maka/foreldur/o.s.fr.

- Har eru nógv ið fáa fíggjarliga hjálp frá foreldrum ella maka, annars høvdu tey verið fíggjarliga illa fyri
- Fleiri megna bara at vera lesandi tí makin hevur fulltíðarstarv
- Fleiri búgva heima hjá foreldrunum, og hava ikki ráð at flyta út
- Fleiri klára seg bara tí tey kunnu leiga íbúð bíligari frá familju
- Fleiri megna bara kostnaðin, tí tey deila leiguna við ein maka

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini –dýrt at betala húsaleigu


- Bústaðir er ov dýrt, og leigan fer støðugt upp
- Studni er ikki nokk til at dekka eina ”bíliga” bústaðarleigu
- Tað ber illa til at fáa alt at hanga saman, um man skal gjalda húsaleigu
- Tað ber illa til at búgva einsamøll/einsamallur
- Har er tørvur á fleiri lestraríbúðum
- Tað er torført at gjalda rentur ella til húsalánið sum lesandi


Bústøða niðurstøður

- Nógvar kvinnuligar lesandi búgva saman við maka og børnum
- Nógvir mannligir lesandi búgva saman við foreldrum og/ella systkjum, annars nokk so javnt um tey búgva einsamallir, ella saman við maka, við ella uttan børn
- Nógv búgva heima, tí tey hava ikki ráð at flyta út
- Fleiri megna bara at hava egnan bústað, tí tey hava familju ið tey kunnu leiga bíligt frá, ella tí makin kann forsyrgja
- Bústaðir er ov dýrt
- Studni er ikki nokk til at dekka eina ”bíliga” bústaðarleigu
- Har mangla (bíligar) lestraríbúðir

Yvirskipað fíggjarstøða


- Kvinnur eru sum heild meira ónøgdar og stúrnar um teirra fíggjarstøðu, meðan menn eru meira neutralir ella nøgdir, men tó stúra teir flestu um teirra fíggjarstøðu viðhvørt






Yvirskipað fíggjarstøða

- Áleið 70% av kvinnunum og 50% av monnunum hava oftast 0 kr eftir ella undirskot tá mánin er liðugur
- Áleið 30% av kvinnunum og 50% av monnunum hava oftast hampiligt av peningi eftir





- Áleið 20% av kvinnunum og 50% av monnonum høvdu lættliga kunna goldið eina eykarokning á 1.000 kr
- Áleið 50% av kvinnunum og 40% av monnonum máttu vera meira sparin í eitt stutt tíðarskeið(1-2 mánaðir) ella nakrar mánaðir
- Áleið 25% av kvinnunum og 15% av monnunum máttu farið í trot, lánt peningin, ella høvdu als ikki megnað at goldið rokningina




Uppsparing og skuld

- Áleið 60% av teimum lesandi hava eina uppsparing, og áleið 50% hava skuld
- Skuldin hjá teimum flestu er bústaðarlán og/ella billán







Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – strongd grunda fíggjarstøðuna

- Summi greiða frá at tað er hart at arbeiða afturat lestrinum, ið í sær sjálvum tilsvarar ein 40 tímars arbeiðsviku
- Summi uppliva eisini, at tað gongur útyvir lesturin at tey noyðast at arbeiða fyri at fáa fíggjarstøðuna at hanga saman
- Summi uppliva, at sjálvt um tey arbeiða við síðurnar av, so megna tey ikki at liva nøktandi
- Summi hava tikið orlov, ella blivin sjúkrameldað, grunda stress og ov nógva byrðu

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini um tey hava fingið fíggjarliga hjálp frá foreldrum, familju ella vinfólki seinasta árið

- Summi hava einki bakland at hjálpa sær
- Summi mugu hava hjálp til at gjalda fyri mat ella húsarlán
- Summi hava ein maka ið betalur fyri mest sum alt

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – umhugsa at gevast/ikki kunna lesa grunda fíggjarstøðuna


- Har eru summi ið vóru noydd til at gevast við at lesa, ella sum umhugsað at gevast, grunda teirra fíggjarstøðu


Yvirskipað fíggjarstøða niðurstøður

- Kvinnur eru sum heild meira ónøgdar og stúrnar um teirra fíggjarstøðu, meðan menn eru meira neutralir ella nøgdir, men tó stúra teir flestu um teirra fíggjarstøðu viðhvørt
  - Hetta samsvarar við at nógvar kvinnur búgva saman við maka og børnum, og hava oftast lítið av peningi eftir tá mánaðin er liðugur, meðan nógvir menn búgva heima hjá foreldrunum, og hava oftara hampiligt av peningi eftir
- Summi uppliva, at tað gongur útyvir lesturin at tey noyðast at arbeiða fyri at fáa fíggjarstøðuna at hanga saman
- Summi uppliva, at sjálvt um tey arbeiða við síðurnar av, so megna tey ikki at liva nøktandi
- Summi hava tikið orlov, ella blivin sjúkrameldað, grunda stress og ov nógva byrðu
- Summi hava einki bakland at hjálpa sær
- Summi hava ein maka ið betalur fyri mest sum alt
- Har eru summi ið vóru noydd til at gevast við at lesa, ella sum umhugsað at gevast, grunda teirra fíggjarstøðu

Studni

- 87,5% av teimum lesandi fáa lestarstuðul frá Studna, og eini 81,1% av teimum lesandi meta ikki at tað man fær frá Studna er hóskandi





Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – um Studni

- Lestrarstuðulin (Studni) burdi verið hægri (áleið 66 viðmerkingar um tað), og samsvarar ikki við at lesnaður skal eitast at vera fulltíðarstarv
- Tað er spell at man ikki fær nakran lestrarstuðul um mann lesur parttíðarlestur (t.d. hálva tíð), ella um man er meira enn 1 ár afturúr
- Tað er óheppið at lestrarstuðulin frá Studna verður ávirkaður av um man hevur lisið niðri og fingið SU
- Lestrarstuðulin er ikki nøktandi til at dekka húsaleigu og aðrar útreiðslur. Hann er bert nøktandi um man býr ókeypis heima hjá foreldrunum
- Tað er alneyðugt at arbeiða við síðurnar av lestrinum ella at eta av uppsparingini fyri at fáa endarnar at røkka saman
- Stuðulin fyri hvørt barn burdi verið hægri enn áleið 1.000 kr, tí útreiðslurnar í samband við hvørt barn eru munandi størri
- Tað er spell at man fær so nógv minni stuðul um man er samlivandi, í mun til um man er einligur forsyrgjari

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – straffaður um man vil/kann/má arbeiða meira

- Fleiri boða frá, at tað er harmiligt at lestrarstuðulin verður mótroknaður. Tað ger tað ringt at fáa nokk av peningi at klára seg við. Tey mæla til at hetta loftið verður hækkað
- Tey meta at hetta eggjar til dovinskap, av tí at tað ikki loysir seg at arbeiða, sjálvt um man kann og vil
- Fleiri mæla eisini til at summarmánaðirnir verða gjørdir til skattafríar mánaðir, so at lesandi hava høvi at byggja upp eina uppsparing hetta tíðarskeiðið
- Tey ið fáa frá almannaverkinum uppliva eisini at vera forðað í at arbeiða, sjálvt um tey hava tíð og hug til tað

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – samanlíkningar við Danmark/SU/útlond


- Fleiri vísa á at lestrarviðurskiftini í mun til studning og stuðulsskipanir (boligstøtte, barnastuðul, o.s.fr.) eru betri niðri
- Fleiri fortelja at tey angra at tey ikki fóru niður at lesa í staðin fyri, ella at tey ikki høvdu viðmælt nøkrum at lesa í Føroyum
- Har verður viðmælt at studningurin verður hækkaður til sama støðið sum hann er niðri
- Fleiri vísa á, at tað er trupult at lesa í Føroyum, um man ikki hevur gott bakland


Studni niðurstøður

- 87,5% av teimum lesandi fáa lestarstuðul frá Studna, og eini 81,1% av teimum lesandi meta ikki at tað man fær frá Studna er hóskandi
- Lestrarstuðulin (Studni) burdi verið hægri (áleið 66 viðmerkingar um tað), og samsvarar ikki við at lesnaður skal eitast at vera fulltíðarstarv
- Tað er spell at man ikki fær nakran lestrarstuðul um mann lesur parttíðarlestur (t.d. hálva tíð), ella um man er meira enn 1 ár afturúr
- Tað er óheppið at lestrarstuðulin frá Studna verður ávirkaður av um man hevur lisið niðri og fingið SU
- Lestrarstuðulin er ikki nøktandi til at dekka húsaleigu og aðrar útreiðslur. Hann er bert nøktandi um man býr ókeypis heima hjá foreldrunum
- Stuðulin fyri hvørt barn burdi verið hægri enn 1.000 kr, tí útreiðslurnar í samband við hvørt barn eru munandi størri
- Fleiri boða frá, at tað er harmiligt at lestrarstuðulin verður mótroknaður. Tað ger tað ringt at fáa nokk av peningi at klára seg við. Tey mæla til at hetta loftið verður hækkað
- Fleiri mæla til at summarmánaðirnir verða gjørdir til skattafríar mánaðir, so at lesandi hava høvi at byggja upp eina uppsparing hetta tíðarskeiðið
- Tey ið fáa frá almannaverkinum uppliva eisini at vera forðað í at arbeiða, sjálvt um tey hava tíð og hug til tað
- Fleiri vísa á at lestrarviðurskiftini í mun til studning og stuðulsskipanir (boligstøtte, barnastuðul, o.s.fr.) eru betri niðri
- Fleiri fortelja at tey angra at tey ikki fóru niður at lesa í staðin fyri, ella at tey ikki høvdu viðmælt nøkrum at lesa í Føroyum
- Fleiri vísa á, at tað er trupult at lesa í Føroyum, um man ikki hevur gott bakland

Flutningur

- Ein meiriluti (62%) av teimum lesandi koyra við egnum bili til Setrið, og 73,2% hava egnan bil







Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – busssambandið

- Bussarnir koyra ikki nóg ofta, og tíðirnar passa ikki til nær fólk skulu til/frá undirvísing
- Tað fer nógv tíð til spillis um man má brúka bussin
- Tað er trupult at hava eitt sosialt lív, arbeiði, ganga til venjing, o.s.fr. um man tekur bussin
- Tað er trupult at nýta bussin um man skal levera og heinta børn áðrenn/eftir undirvísingina

Flutningur

- Tey flestu høvdu ikki sloppið sær av við bilin, sjálvt um tað var gjørligt ella lættari at taka bussin, ella um tey kundu fingið bústað nærri teirra undirvísingarstað





Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – dýrt at pendla


- Fleiri eftirlýsa avsláttur/stuðul til tunnilsgjald
- Fleiri eftirlýsa koyripengar
- Tað er dýrt at pendla langt til Setrið


Flutningur niðurstøður

- Ein meiriluti (62%) av teimum lesandi koyra við egnum bili til Setrið, og 73,2% hava egnan bil
- Bussarnir koyra ikki nóg ofta, og tíðirnar passa ikki til nær fólk skulu til/frá undirvísing
- Tað er trupult at hava eitt sosialt lív, arbeiði, ganga til venjing, o.s.fr. um man tekur bussin
- Tað er trupult at nýta bussin um man skal levera og heinta børn áðrenn/eftir undirvísingina
- Tey flestu høvdu ikki sloppið sær av við bilin, sjálvt um tað var gjørligt ella lættari at taka bussin, ella um tey kundu fingið bústað nærri teirra undirvísingarstað
- Fleiri eftirlýsa avsláttur/stuðul til tunnilsgjald
- Fleiri eftirlýsa koyripengar
- Tað er dýrt at pendla langt til Setrið

Lesandi arbeiða við síðurnar av lestrinum


- 84,4% av teimum lesandi ið svaraðu, hava arbeiði, ið tey fáa løn ella samsýning fyri við síðurnar av lestrinum. Áleið 60% av teimum ið arbeiða hava lestrarviðkomandi starv, áleið 40% hava ikki






Lesandi arbeiða við síðurnar av lestrinum


- 78,6% av teimum lesandi, ið svaraðu, mettu, at tað var neyðugt at arbeiða fyri at fáa tað at hanga saman fíggjarliga
- Í miðal arbeiða tey lesandi, ið hava arbeiði við síðurnar av lestrinum, 14,8 tímar um vikuna






Arbeiðið gongur út yvir lesturin

- 57,9% svaraðu, at arbeiði hevur neiliga ávirkan á lesturin, har:
- Meirilutin (52,4%) ikki altíð hevur tíð til at fyrireika seg til undirvísingina
- 34,1% svaraðu, at arbeiði krevur nógv, og at tey tí ikki altíð hava líka nógva orku til fyrireiking, undirvísing, innlatingar ella bólkaarbeiði
- 21,9% viðhvørt máttu taka arbeiði fram um undirvísing og royndarstovur (en. *labs*)





Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – um at arbeiða við síðurnar av lestrinum

- Fleiri fortelja at tað er gevandi at hava lestrarstarv ið er viðkomandi fyri sín lestur, síðan man kan royna tað man lærir í praksis, o.s.fr.
- Fleiri eru eisini heppin at hava eitt fleksibult starv, ella eitt gott arbeiðspláss/góðan leiðara, ið tillagar arbeiðið eftir lesnaðin hjá tí lesandi
- Tó halda fleiri at tað er óheppið at man noyðist at arbeiða við síðurnar av lestrinum, har summi mugu taka arbeiðið framum lesturin, fyri at fáa fíggjarstøðuna at ganga upp
- Fleiri hava trupult við at lesa tað tey skulu/koma til undirvísingina, av tí at tey arbeiða við síðurnar av lestrinum
- Summi eftirspyrja fleiri lestrarviðkomandi lestrarstørv
- Hjá summum ávirkar tað familjulívið/sálarheilsuna, at tey mugu arbeiða afturat lestrinum

Arbeiða við síðurnar av lestrinum niðurstøður


- 84,4% av teimum lesandi ið svaraðu, hava arbeiði, ið tey fáa løn ella samsýning fyri við síðurnar av lestrinum. Áleið 60% av teimum ið arbeiða hava lestrarviðkomandi starv, áleið 40% hava ikki
- 78,6% av teimum lesandi, ið svaraðu, mettu, at tað var neyðugt at arbeiða fyri at fáa tað at hanga saman fíggjarliga
- Í miðal arbeiða tey lesandi, ið hava arbeiði við síðurnar av lestrinum, 14,8 tímar um vikuna
- 57,9% svaraðu, at arbeiði hevur neiliga ávirkan á lesturin, har:
- Meirilutin (52,4%) ikki altíð hevur tíð til at fyrireika seg til undirvísingina
- 34,1% svaraðu, at arbeiði krevur nógv, og at tey tí ikki altíð hava líka nógva orku til fyrireiking, undirvísing, innlatingar ella bólkaarbeiði
- 21,9% viðhvørt máttu taka arbeiði fram um undirvísing og royndarstovur (en. labs) Fleiri fortelja at tað er gevandi at hava lestrarstarv ið er viðkomandi fyri sína lestur, síðan man kan royna tað man lærir í praksis, o.s.fr.
- Fleiri eru eisini heppin at hava eitt fleksibult starv, ella eitt gott arbeiðspláss/góðan leiðara, ið tillagar arbeiðið eftir lesnaðin hjá tí lesandi
- Tó halda fleiri at tað er óheppið at man noyðist at arbeiða við síðurnar av lestrinum, har summi mugu taka arbeiðið framum lesturin, fyri at fáa fíggjarstøðuna at ganga upp
- Fleiri hava trupult við at lesa tað tey skulu/koma til undirvísingina, av tí at tey arbeiða við síðurnar av lestrinum
- Summi eftirspyrja fleiri lestrarviðkomandi lestrarstørv
- Hjá summum ávirkar tað familjulívið/sálarheilsuna, at tey mugu arbeiða afturat lestrinum

Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini – ymiskt

- Har burdi verið meira lestraravsláttur (á matvørur, bøkur, trygging, klæðir, og tílík alneyðug ting)
- Starvslæra í samband við lesturin burdi verið lønt
- Har verður víst á at maturin á Setrinum er dýrur
- Har verður viðmælt at man fær bókastuðul
- Har verður viðmælt at man fær fleiri møguleikar fyri fjarlestur, um man hevur langan veg til Setrið, har er óveður, ella um man er heima við sjúkum barni


Príshækkingar


- 75% av teimum lesandi siga at príshækkingarnar hava ávirkað teirra fíggjarviðurskifti
- Áleið 20% av teimum lesandi siga at príshækkingarnar hava møguliga ávirkað teirra fíggjarviðurskifti



Príshækkingar

- 42% hava ikki líka væl ráð til lestrarbøkur ella tilfar
- 39% mugu arbeiða meira og hava minni tíð til lesturin
- 28% hava ikki ráð til sosiala partin av lestrarlívinum





Viðmerkingar frá lesandi úr spurnarkanningini um príshækkingin hevur ávirkað teirra atburð

- Summi boða frá at tey spara meira, keypa minni inn, ella keypa stórt tá tilboð er, keypa meira brúkt, eru meira varug við hvat ting kosta, eru strongd, og brúka minni uppá persónliga røkt, sjálvt heilivág, mentala heilsu og tannlækna

Príshækkingar niðurstøður

- 75% av teimum lesandi siga at príshækkingarnar hava ávirkað teirra fíggjarviðurskifti
- Áleið 20% av teimum lesandi siga at príshækkingarnar hava møguliga ávirkað teirra fíggjarviðurskifti

- Viðvíkjandi ávirkan á lestur:
- 42% hava ikki líka væl ráð til lestrarbøkur ella tilfar
- 39% mugu arbeiða meira og hava minni tíð til lesturin
- 28% hava ikki ráð til sosiala partin av lestrarlívinum
- Fólk eru ávirkað á ymiskan hátt. Summi keypa minni inn, eru strongd, umhugsa at gevast við lestrinum, ella at byrja at arbeiða við síðurnar av

- Viðvíkjandi ávirkan á atburð:
- 56% keypa minni inn
- 45% fara minni út við vinfólkum
- 37% hava spart undirhald burtur(t.d. Netflix ella spøl)
- 24% leypa máltíðir um
- 23% fara minni til tannlækna
- Summi boða frá at tey spara meira, keypa minni inn, ella keypa stórt tá tilboð er, keypa meira brúkt, eru meira varug við hvat ting kosta, eru strongd, og brúka minni uppá persónliga røkt, sjálvt heilivág, mentala heilsu og tannlækna

Endaorð

Sum er, eru fleiri lesandi, ið viðmerkja, at tey ikki høvdu viðmælt nøkrum at lesa í Føroyum, tá ið tey hoyra, hvussu nógv betur ymisk kor, millum annað fíggjarligu korini, eru, hjá teimum, ið lesa niðri.

Sum er, er tað torført og/ella dýrt at pendla til Setrið, og tað er torført at finna sær lestraríbúð, og prísirnir á tær ið eru, hanga ikki saman við upphæddina á lestrarstuðulin man fær frá Studna.

Sum er, ber eisini illa til at lesa tá ið man hevur børn og maka. Vilja vit hava at fólk mugu velja ímillum at nema sær útbúgving og at fáa børn? Umstøðurnar mugu broytast, so at tað skal vera møguligt at vera lesandi og at hava børn og maka.

Niðurstøðan av hesi framløgu og spurnarkanning má vera at stig mugu takast fyri at bøta um umstøðurnar hjá teimum, ið velja at lesa hægri lestur í Føroyum (á Setrinum).

* Allar stabbamyndir í hesi framløgu eru framleiddar av einum starvsfólki á Lestrarskrivstovuni á Setrinum.